# ítróttur

Nr. 26 • mánadagur • 6. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo


# Jón skal kappast um HM

**27 ára gamli Jón Rosenblad úr Lamba verður millum teir 150 rógvararnar, sum 25. februar skulu rógva um HM-heitið**


**RÓGVING**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*


Jón Rosenblad er sterkasti føroyski rógvarin, og eftir at hann hevur fingið góð úrslit í Danmark, hevur hann nú rættiliga fingið blóð á tonna.

Jón ætlar sær nevniliga at verða við í HM í innandurarógving, og kappingin verður 25. februar í Boston, skrivar www.drekin.fo

Um vikuskiftið verður annars óalment FM í innandurarógving hildið, og Jón kemur ikki heim til kappingina av tí sama.

Jón heldur, at hevur hann ein av sínum allarbestu døgum, kann hann vinna fram millum teir 20 bestu rógvararnar í heiminum.



*Nú verður tað í HM-høpi, at Jón Rosenblad skal royna seg*

# Jón Rói skaddur í knænum

**AaB-venjarin er imponeraður av føroyska landsliðsspælaraunum, og hann harmast um, at Jón Rói fekk skaða á venjingarlegu í Turkalandi**


**FÓTBÓLTUR**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*


Jón Rói Jacobsen fór út við skaða, tá ið AaB leygardagin spældi venjingardyst í Turkalandi. Góðir 20 minuttir vóru spældir, tá ið Jón Rói fekk ein løst í knæið. Suni Olsen kom á vøllin fyri Jón Róa og spældi við restina av dystinum.

Enn er ikki greitt, hvussu álvarsamur skaðin hjá Jón Róa er, men í AaB vóna tey, at talan er ikki um nakran álvarasaman skaða.

– Jón Rói hevur imponerað meg á venjingarleguni. Hann er ein klókur spælari, og vit vóna sjálvandi, at knæskaðin ikki er alvorligur, sigur Erik Hamrén, venjari hjá AaB, við heimasíðuna hjá felagnum.

Tá ið Jón Rói Jacobsen spældi fyri Brøndby sleit hann krossband í knæum, og tað tók honum mesta av einum ári at koma fyri seg aftur. Vónandi verður ikki talan um slíkan skaða hesaferð.

**Suni eisini við**

Suni Olsen hevur í vetur drigist við ein skaða, men hann er við at koma fyri seg aftur, og leygardagin slapp hann veruliga at royna seg á liðnum hjá AaB aftur.

– Tað er gott at síggja Suna aftur á vøllinum, sigur Erik Hamrén.

AaB kom sunnudagin aftur til Danmarkar, eftir at liðið hevur verið eina viku í Turkalandi og vant. Hesa vikuna byrjar norðurlendska kappingin Royal League aftur, og AaB skal spæla ímóti norska felagnum Lyn.


# VETRARTILBOÐ

Frá Ivan Johansen Bilum

**Skoda Octavia 1,6i**



Árg. aug 2001 · km. 58.000
Fyrr kr. 105.000,-
**Nú kr. 85.000,-**

**Seat Cordoba Vario 1,4**



Árg. aug 1998 · km. 97.000
Fyrr kr. 65.000,-
**Nú kr. 40.000,-**

**Peugeot 306GTI 170HK 3H**



Árg. aug 1999 · km. 175.000
Fyrr kr. 90.000,-
**Nú kr. 75.000,-**

**Citroen Xantia 1,9td Week**



Árg. aug 1998 · km. 144.000
Fyrr kr. 99.000,-
**Nú kr. 70.000,-**

**Citroen Xantia HDI 5h**



Árg. aug 1999 · km. 158.000
Fyrr kr. 95.000,-
**Nú kr. 75.000,-**

UPPLATINGARTÍÐIR:
MÁNADAG TIL FRÍGGJADAG
08.00 - 17.00
Í VIKUSKIFTINUM ER STONGT

**Seat 1,9 SDI Cordoba sedan**



Árg. aug 1999 · km. 128.000
Fyrr kr. 59.000,-
**Nú kr. 45.000,-**

VÆLKOMIN TIL www.ivan.fo
Ivan Johansen Bilar
TELEFON 31 36 66

Tilboðini eru bert galdandi um eingin bilur er í býti

**VIT HAVA EISINI SERA GÓÐAR VØRUVOGNAR Á GOYMSLU**

Sosialurin 341800